**Úrtøka til at umboða Seyðahundasambandið í uttanlandakappingum.**

Hundar, sum luttaka fyri Seyðahundasambandið í kappingum uttanlands, skulu vera skrásettir í ISDS. Hetta er krav samb. ISDS reglum.

Tey sum hava vunnið sær pláss til uttanlandakappingar í kappingarárinum – tvs. hundar sum luttaka í 2022, hava úrtøku í 2021/22.

Kappingarárið er frá 1.apríl í árinum og fram til 31.mars árið eftur.

Hvørt limafelag undir seyðahundasambandinum hevur eina kvalifikatións kapping í kappingarárinum. Limafeløg kunnu samstarva sínamillum, um kappingar stað. Sambandi samskipar kalendara og ásetur nær og hvar hesar vera hildnar. Kappingarkalendarin eigur at vera endaligur áðrenn kappingarárið er liðugt og í seinasta lagi 1.apríl . Miða verður eftir at kvalifikatiónkappingar hava so vítt møguligt ISDS standardir.

Lutakarir umboðandi Seyðahundasambandið, vera avgjørdar í omanfyri nevndu kvalifikatiónskappingum.

Hundar kunnu bert umboðað Seyðahundsambandið í uttanlands kappingum, um hann hevur vunnið sær stig í klassa 3.

Stig verða givin eftir niðanfyristandandi stigatalvu:

## Stigtalva

Nr. 1 fær 7 stig

Nr. 2 fær 6 stig

Nr. 3 fær 5 stig

Nr. 4 fær 4 stig

Nr. 5 fær 3 stig

Nr. 6 fær 2 stig

Nr. 7 fær 1 stig

Stendur á jøvnum millum tveir ella fleiri hundar, verða stigini av teimum kappingum, sum telja við, løgd saman, og tann sum hevur flest stig, vinnur sær plássið.

Stendur framvegis á jøvnum, verður hugt eftir hvør samanlagt hevur flest stig í OLF í teimum kappingum sum telja við. Stendur framvegis á jøvnum, hevur hugt eftir samanløgdu stiginunum í OLFD, OLFDS, OLFDSP og at enda eftir OLFDSPS.

Stendur framvegis á jøvnum, verður vinnarin funnin við lutakasti

Seyðahundasambandið tekur altíð atlit til djóravælferð og má kappingarseyður ikki brúkast ov ofta sama dag, helst ikki meira enn tvær ferðir ígjøgnum.

Vinarliga

Nevndin

28-04-2022